Giggs er tann besti

Portugisiski venjarin Jose Mourinho, sum er venjari hjá Inter, heldur, at Ryan Giggs mann vera tann besti spælarin, sum hevur spælt í ensku Premier League. - Hvat kann mann siga um ein spælara, sum hevur vunnið Premier League 10 ferðir. Hansara gullmerki eru prógvið. Hann er helst besti spælarin í søguni hjá Premier League, sigur Mourinho.



Ribery á veg til Barca

Týska blaðið Bild vil vera við, at franski stjørnuspælarin Franck Ribery er á veg til spanska felagið Barcelona. Ribery hevur sáttmála við FC Bayern í Týsklandi fram til 2011, men Ribery hevur sjálvur sagt, at hann roknar ikki við, at hann verður alt sáttmálaskeiðið í Bayern. Bild skrivar nú, at Barcelona er favorittur til at gera avtalu við Ribery.

Kyndil-H71 17-21 (9-8)

H71 á finalukós

Hoyvíkingar greiddi sína skyldu, tá teir vitjaðu hjá Kyndli í gjár. Tvær útvísingar í seinna hálvleiki komu dátt við hjá heimaliðnum, og tá kundi H71 lætt renna undan.

HONDBÓLTUR

Uni Holm Johannesen
uni@sosialurin.fo

Tá bæði Hans Áki Dal-Christiansen og Janus Einar Sørensen miðskeiðis í seinna hálvleiki noyddust út at sita í tveir minuttir, fall avgerðin. Gestirnir øktu leiðsluna úr tveimum upp í fýra mál, og síðan kundu hoyvíkingar frøast um triðja sigurin upp í slag.

H71 vann seg í gjár upp á annað finaluplássið. Við ósigrinum hjá Neistanum í Vestmanna, komu hoyvíkingar upp á liðina á steypavinnarunum, sum hava verri málúrtøku enn H71.

Fylgdust fyrra umfarið

Kyndil hevur áður í hesum kappingarárinum stolið stig frá oddaliðunum. Hoyvíkingar væntaðu sær sjálvsagt ein torføran dyst, og tað fingu teir sanniliga eisini.

Liðini fylgdust allan fyrra hálvleik. Í málinum hjá Kyndli stóð Erlendur Johannesen sera væl og vardi fyri fleiri atsóknum hjá gestunum.

Serliga høvdu gestirnir úr Hoyvík torført at verja fyri Hans Áka Dal-Christiansen, sum var toppskjútti hjá Kyndli við sjey málum.

Støðan í hálvleikinum var 9-8 til Kyndil.

H71 fer avstað

Heimaliðið dugdi væl at taka ferðina úr spælinum hjá hoyvíkingum. Men stríðshuganum bilti einki hjá gestunum, og tað hjálpti sera væl í løtum, tá spælið ikki riggaði. H71 hevði fleiri valmøguleikar í álopspartinum, har Esbern Paturs-son, Halgir Dahl Olesen, Dánjal Torgarð og Bárður Brimvík royndust væl.

H71 var á odda 15-13, tá Kyndil fekk tvær útvísingar. Gestirnir tóku av og avgjørdu við tveimum málum í hesum tíðarskeiðnum, so Kyndil ikki megnaði at svara aftur.

Hoyvíkingar hava sjáldan ligið so væl fyri í oddastríðnum sum nú. Komandi vikuskiftið vitja kollfirðingar í Hoyvík, og tá er kravið aftur tvey stig.

Halgir Dahl-Olesen úr H71 roynir at skræða seg leysan av Hans Áka Dal-Christiansen úr Kyndli í dystinum í gjár, sum flutti H71 nærri finaluni

Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

Útvísingarnar var ikki avgerandi

Útvísingarnar av Janusi Einar Sørensen og Hans Áka Dal-Christiansen miðskeiðis í seinna hálvleiki gjørdu støðuna hjá hoyvíkingum væl lættari. Men tað var ikki avgerandi, staðfestir Dánjal Torgarð úr H71:

– Tað var ikki júst tað, ið gjørdi størsta munin. Vit spæla betur í seinna hálvleiki, og verjan stóð aftur sera væl. Men sjálvandi verður tað lættari, tá vit eru fleiri, sigur landsliðsleikarin.

Tit hava nú vunnið tríggjar ferðir upp í slag. Hvat skyldast góða gongdin?

– Vit hava verið nógv meira avgjørdir seinastu dystirnir og hava tikið initiativ. Serliga hevur verjan riggað ótrúliga væl.

Verður H71 í finaluni í 2009?

– Eingin ivi, slær Dánjal Torgarð fast.

uni

Neistin skal ikki í finaluna

Kyndil hevur seinastu vikurnar havt lítið og einki at spælt fyri, og tað merkist væl, staðfestir Torvald Abrahamsen úr havnarfelagnum:

– Sjálvsagt er tað harmiligt, at dystirnir ikki hava stórvegis týdning. Men vit fara altíð fyri at vinna og gera okkara besta. Annars er eingin meining við at spæla dyst, sigur Torvald Abrahamsen.

Komandi vikuskiftið spæla tit móti Neistanum. Hvussu er útlitini fyri tann dystin?

– Vit skulu í øllum førum syrgja fyri, at Neistin ikki kemur í finaluna, staðfestir Torvald Abrahamsen.

uni

FAKTA um dystin

Kyndil-H71 17-21 (9-8)
10 min: 2-4
20 min: 7-6
40 min: 13-12
50 min: 14-17
Málskjúttar
Kyndil: Hans Áki Dal-Christiansen 7 (2), Jónleif Sólsker 4 (2), Hans Arni Thomasen 3, Janus Einar Sørensen 2, Tummas Pauli Hanusarson 1
H71: Esbern Paturson 4, Dánjal Torgarð 4 (2), Halgir Dahl-Olesen 4, Bárður Brimvík 3, Regin Joensen 2, John Petersen 1, Janus Sørensen 1, Hans Kári Hansen 1
Brotskøst: Kyndil 6, H71 2
Útvísingar: Kyndil 3, H71 3
Dómarar: Ragnar Simonsen & Rúni Mohr

Hondbóltur

Sunset-kappingin

	dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1 Stjørnan	17	13	-	1	-	3	447	359	88	27
2 VB	17	12	-	0	-	5	493	400	93	24
3 Tjaldur	17	10	-	3	-	4	465	394	71	23
4 Neistin	17	9	-	3	-	5	445	415	30	21
5 StÍF	17	3	-	1	-	13	416	505	-89	7
6 Kyndil	17	0	-	0	-	17	296	489	-193	0

Atlantic Airways-kappingin

	dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1 VÍF *)	16	13	-	0	-	3	448	413	35	26
2 H71	17	11	-	0	-	6	451	389	62	22
3 Neistin *)	16	10	-	0	-	6	470	438	32	20
4 StÍF	17	7	-	2	-	8	407	417	-10	16
5 Kyndil	17	4	-	2	-	11	401	453	-52	10
6 KÍF	17	3	-	0	-	14	401	468	-67	6

*) Kappingarnevndin hevur ógildað úrslitið av dystinum millum Neistan og VÍF tann 18. januar, og tí er hesin ikki roknaður við á stigatalvuni